

**TOYOTA YARIS 1.4 LUNA 5D** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** KE 941 **Km:** 20.000
**Árgangur:** 11.05.2006
**Útgjald:** 38.000 **Mðr. gjald:** 2.450 (5 ár)
**kr. 142.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.6 STC.** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** MR 781 **Km:** 36.000
**Árgangur:** 29.05.2006
**Útgjald:** 43.750 **Mðr. gjald:** 2.856 (5 ár)
**kr. 168.000,-**



**OPEL ASTRA 1.6**

**Skrásetingarnr:** KS 370 **Km:** 120.000
**Árgangur:** 08.10.2002
**Útgjald:** 17.500 **Mðr. gjald:** 1.700 (3 ár)
**kr. 68.000,-**



**COROLLA 1.4 LUNA B. D-4D** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SF 673 **Km:** 88.209
**Árgangur:** 19.05.2005
**Útgjald:** 42.000 **Mðr. gjald:** 2.700 (5 ár)
**kr. 148.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2.0 SOL** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** UE 915 **Km:** 42.000
**Árgangur:** 23.01.2004
**Útgjald:** 42.000 **Mðr. gjald:** 4.100 (3 ár)
**kr. 168.000,-**



**TOYOTA RAV4 2.0 VVT-I PLUS** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** LF 118 **Km:** 12.000
**Árgangur:** 16.07.2007
**Útgjald:** 69.500 **Mðr. gjald:** 4.400 (5 ár)
**kr. 278.000,-**



**AVENSIS 2.0 D-4D SOL DIESEL S/D** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** RV 811 **Km:** 113.500
**Árgangur:** 03.12.2003
**Útgjald:** 47.500 **Mðr. gjald:** 4.600 (3 ár)
**kr. 168.000,-**



**MAZDA 626 1.8i**

**Skrásetingarnr:** KJ 150 **Km:** 123.000
**Árgangur:** 10.06.2002
**Útgjald:** 18.000 **Mðr. gjald:** 1.800 (3 ár)
**kr. 72.000,-**



**FORD MONDEO 2.0 TDCI** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** BM 231 **Km:** 150.000
**Árgangur:** 25.10.2002
**Útgjald:** 30.500 **Mðr. gjald:** 3.000 (3 ár)
**kr. 108.000,-**



**SUBARU LEGACY 2.0 AUT.** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** AD 873 **Km:** 100.000
**Árgangur:** 09.03.2006
**Útgjald:** 49.500 **Mðr. gjald:** 3.172 (5 ár)
**kr. 178.000,-**

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

**6 mánaða garanti**

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

**REYNI SERVICE** P/F


# Gamal kenningur hóttir við at bjóða seg fram

**Í Íslandi hevur gamli javnaðarformaðurin Jón Baldvin Hannibalsson lagt seg út í kjakið um, hvør skal standa á odda fyri flokkinum, sum nú eitur Samfylkingin**



*Jón Baldvin Hannibalsson var altingsmaður í mong ár og hevur verið fíggjarmálaráðharri og uttanríkisráðharri. Hann hevur eisini verið skúlastjóri, blaðstjóri og sendiharri*
*(Mynd: Altingið)*

**ÍSLAND**
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Tað var einki minni enn ein bumba í tí politiska umhvørvinum í Íslandi, tá fyrrverandi javnaðarformaðurin Jón Baldvin Hannibalsson um vikuskiftið gjørdi greitt, at eftir hansara tykki eigur Ingibjørg Sólrún Gisladóttir at fara frá sum formaður í flokkinum, sum nú eitur Samfylkingin. Ístaðin eigur núverandi forsætisráðharrin, Jóhanna Sigurðardóttir, at taka við formansstarvinum. Jón Baldvin Hannibalsson legði afturat, at vil Ingibjørg Sólrún ikki víkja fyri Jóhonnu, er tann gamli formaðurin til reiðar at stilla upp sum valevni til formansstarvið.

Ingibjørg Sólrún Gísladóttir er í farloyvi vegna sjúku, men flokssystirin Jóhanna Sigurðardóttir var skjót at siga sína hugan um uppskotið hjá tí gamla formanninum. Í samrøðu við ríkisútvarpið segði hon seg undrast á orðini hjá gamla formanninum, og hon gjørdi greitt, at hon hevur als ikki somu hugsan sum hann.

- Ingibjørg er formaður í Samfylkingini og ein sterkur formaður, og eg vænti, at hon kemur styrkt aftur aftan á sjúkrafarloyvið, segði Jóhanna Sigurðardóttir við útvarpið.

Tað er kortini greitt, at Jón Baldvin Hannibalsson verður ikki formaður í Samfylkingini, ikki á hesum sinni í hvussu er. Sambært viðtøkum floksins verður formaðurin valdur á landsfundi, og uppskot um formansevni skal koma inn seinast 45 dagar unan fundinum. Í ár er landsfundurin 26. mars, og tí er gamli formaðurin ov seinur á sjóvarfallinum.

## Samanbar Dávið við Hitler

Jón Baldvin Hannibalsson, sum fyllir 70 um nakrar dagar, er ein av teimum gomlu í íslendskum politikki, og hann er ikki bangin fyri at siga sína hugsan. Soleiðis var eisini á javnaðarfundinum í Reykjavík um vikuskiftið, har hann var høvuðsrøðari.

Fyrrverandi floksformaðurin og ráðharrin brúkti sum vera man ein part av røðuni til at lýsa fíggjarkreppuna og serliga bankakreppuna. Hann legði ikki fingrarnar ímillum og gav leiðsluni í Sjálfstæðisflokkinum og Landsbankanum skyldina av tí mesta, men formenninir í teimum flokkum, sum hava myndað stjórnarsamgongu tey seinnu árini, bera eisini ábyrgd, segði hann. Við hesum sipaði hann til Framsóknarflokkin og Samfylkingina. Men eftirlitsstovnarnir og fremstir av teimum Seðlabankin hava eisini ábyrgd av tí, sum er hent, segði Jón Baldvin Hannibalsson, sum hevði sína egnu hugsan um Dávið Oddsson, seðlabankastjóra:

- Har inni sat maður, so tað minti um seinastu dagar Hitlers. Tá hugsað verður um leiklut hansara í tí, sum hendi banka- og fíggjarkervinum, átti hann at komið út eyðmjúkur og biðið um umbering, segði Jón Baldvin Hannibalsson um Dávið Oddsson.



*Ingibjørg Sólrún Gísladóttir er formaður í Samfylkingini*
*(Mynd: Vísir)*



*Jóhanna Sigurðardóttir, forsætisráðharri, vil hava Ingibjørg at halda fram sum floksformaður*
*(Mynd: Vísir)*